# VITAN TIL VARANDI ALING 2022

Fiskaaling

# FISKAALING

## Um okkum

P/F Fiskaaling er skipað sum partafelag, sum Føroya landsstýri eigur. Endamál felagsins er, smb. løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2009:

- at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni
- at reka vinnuligt virksemi innan hetta virksemisøki og
- annað starv í hesum sambandi

Árliga játtanin á Løgtingsins fíggjarlóg til havbúnaðarroyndir er við til at tryggja, at Fiskaaling heilt ella lutvíst kann fíggja sítt granskingar-, menningar- og ráðgevingarvirksemi, hvørs endamál er at framleiða vitan um aling. Játtanin er viðvirkandi til at Fiskaaling kann søkja fígging úr føroyskum og útlendskum granskingargrunnum. Harafturat fær Fiskaaling inntøkur fyri ráðgeving og tænastur, sum felagið veitir føroysku alivinnuni.

Fiskaaling hevur sáttmála við Uttanríkis- og vinnumálaráðið um gransking, menning og ráðgeving. Sáttmálatíðarskeiðið fevnir um árini 2021-2023.



# VITAN TIL VARANDI ALING

**Gransking á Fiskaaling**

Visjónin VITAN TIL VARANDI ALING er okkara leiðistjørna og grundarlagið undir øllum arbeiði, sum verður gjørt á Fiskaaling. Hví? Jú, tað er tí at vitan er grundleggjandi fyri burðardyggu menningini av alivinnuni.

Alivinnan er lívfrøðiliga viðbrekin, og neyðugt er áhaldandi at fáa vitan um firðir okkara og vælferðina hjá laksinum, soleiðis at øll menning av alivinnuni byggir á vitan.

Alivinnan er eisini dagliga í harðari altjóða kapping. Tí er tað sera umráðandi, at gransking innan aling fer fram í Føroyum, og at vit áhaldandi menna hættir, ið kunnu optimera alingina, soleiðis at alivinnan framhaldandi kann vera lønandi.

Á Fiskaaling eru umleið 30 starvsfólk, sum eru skipað í fýra fakdeildir: Biotøkni, Fiskaheilsa, Fjarðaelvi og Vistfrøði. Høvuðssæti hjá Fiskaaling er við Áir, og her húsast granskarar og kanningarfólk umframt fyrisiting og leiðsla.

Starvsfólk á Biotøknideildini halda til á granskarasetrinum iNOVA í Tórshavn. Á iNOVA hava granskarar atgongd til nýmótans starvsstovur, framkomin tól og tøkni.



**VN182**
**ANDRIAS REINERT**

**Deksútgerð á bátinum**
Palfinger PK4501 krani (2020)
Línuspæl
Øll vanlig nautisk útgerð
Capstan 1000 kg (2020)

**Maskinan**
Sisu Diesel (2022), typa 74 CTIM
235 kW/320 hk

**Bygdur**
Sydvest Stålbåtar, Svøríki í 1986

**Dimensiónir**
11,4 BT
3,4 NT
LOA: 13,0 m
Breidd: 3,9 m
Dýpd: 1,6 m




**Granskingarfarið hjá Fiskaaling**
Granskingarfarið er navngivið eftir Andriasi Reinert, sála (1934-2019), sum var stjóri á Fiskaaling í tíðarskeiðnum 1974-1995. Í 2022 var VN182 Andrias Reinert úti á 24 rannsóknartúrum.

# KALDBAKS- OG TANGAFJØRÐUR UNDIR SJÓNEYKUNA

Gransking

Í 2021 fór Fiskaaling undir at gera umfatandi undankanningar á Kaldbaksfirði. Hetta var eftir áheitan frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, ið ynskti at gera kanningar áðrenn fjørðurin skal bjóðast út til kræklingaaling. Endamálið var at lýsa, hvørja ávirkan vindur, avfall og sjóvarfall hava á rák og útskifting á firðinum fyri at kunna meta um útskifting og tynning av møguligari mikrobiologiskari dálking á firðinum. Undankanningararbeiðið endaði í 2022 við drúgvari frágreiðing, ið var latin myndugleikanum.

Eisini gjørdi Fiskaaling eDNA kanningar av sjógvsýni á ymiskum kanningarstøðum á Kaldbaksfirði í 2022. Endamálið var at kanna hvussu innihaldið av plantuæti broytist gjøgnum árið. Fyri at góðskutryggja kanningarúrslitini vóru kanningarnar samanbornar við kanningarúrslit, sum Havstovan hevði innsavnað.

Verkætlanin FjordProcess, ið fór av bakkastokki í 2022, er fíggjað av granskingarskránni um havgransking í Norðuratlantshavi. Hendan verkætlanin, sum er eitt samstarv millum Havstovuna, Aarhus Universitet og Fiskaaling, vil fyri fyrstu ferð greina hvussu sambandið er millum føroysku firðirnar og Landgrunnin, við serligum atliti til føðsluevni og gróður.




Í verkætlanini FjordProcess verður granskingarfarið Andrias Reinert nýtt, tá kanningar skulu gerast á grunnum vatni, meðan framkomna havrannsóknarskipið Jákup Sverri verður nýtt, til kanningarnar á opnum havi.




Granskarar á Fiskaaling seta streymmátarar út.

# FMHAT – FØROYSKI MIÐDEPILIN FYRI HÁAVRIKANDI TELDUMEGI

**Modelleringar**

Alsamt fleiri øki í samfelagnum hava tørv á nógvari roknikraft og stórari teldumegi. Hetta er eisini galdandi hjá Fiskaaling, tá vit myndla havstreymar og lúsaspjaðing ella greina ílegur.

Fiskaaling hevur ment 3D havmyndilin FarCoast í samstarvi við norsku havstovuna IMR. Í fyrstu atløgu vórðu útrokningarnar gjørdar í Norra og úrslitini send til Føroya so hvørt. Hendan arbeiðsgongdin kann vera tíðarkrevjandi, avmarkandi fyri granskingararbeiðið og dýr.

Granskarar á Fiskaaling eru tí farnir undir verkætlanina FMHAT, sum er stytting fyri Føroyski Miðdepilin fyri Háavrikandi Teldumegi. Endamálið við verkætlanini er at menna umhvørvið fyri háavrikandi teldumegi á Fiskaaling og í Føroyum. Fyrsta stig er, at útbyggja superteldusa á Fiskaaling og betra førleikarnar í at nýta háavrikandi teldumegi. Síðani er ætlanin at teldur hjá øðrum stovnum og feløgum í landinum, kunnu bindast í netverkið.

At hava eina stóra rokniteldu er kostnaðarmikið, og við hesum leisti kunnu onnur, ið bara av og á hava tørv á stórari roknimegi, hava atgongd til eina superteldu. Á hendan hátt kann háavrikandi teldumegi gerast tøk fyri fleiri, eisini teimum við avmarkaðum telduførleikum.

FMHAT verkætlanin fer at betra um umstøðurnar í Føroyum at gera nýggjar granskingarverkætlanir komandi árini.





FarCoast er ein 3D háupploystur numeriskur havmyndil, sum lýsir rákið, umframt salt og hita rundan um Føroyar og á føroyskum firðum.

# BOTNDJÓR GEVA KUNNLEIKA UM ÁRIN FRÁ ALIVIRKSEMI

**Dálking**

Umhvørvisgóðkenningar av alistøðum á sjónum hava ásetingar um, at tað skulu gerast kanningar av botninum á aliøkinum og á firðunum. Sýni verða tikin við grabba, og øll djór, ið eru størri enn 1 mm, verða eyðmerkt. Hesar kanningar hava verið gjørdar síðani 1998. Tað eru góðkend feløg, ið hava gjørt botnkanningarnar fyri alifeløgini. Úrslitini frá hesum kanningum eru m.a. eitt yvirlit yvir, hvørji djórasløg eru í sýninum, og hvussu nógv eru til av teimum.

Tað er við støði í hesum úrslitum, at Fiskaaling fór undir granskingararbeiðið at menna eina flokkingarskipan, ið kann nýtast til at meta um ávirkanina av alivirkseminum á havbotninum.

Allar dátur hetta tíðarskeið vórðu gjøgnumgingnar, og eyðmerkt var hvørji djór- og djórasamfeløg vóru á botni, ið ikki vóru ávirkaði av alivirksemi. Síðani vórðu ymisk vísitøl fyri fjølbroytni og viðkvæmi, ið verða nýtt í okkara grannalondum, gjøgnumgingin og mett varð hvussu hesi kunnu brúkast at meta um dálkingarstøðuna á føroysku firðunum.

Flokkingarskipanin, ið flokkar úrslit frá eini botndjórakanning í ymiskar dálkingarflokkar, er eitt amboð, sum myndugleikar, alifeløg o.o. kunnu brúka til at meta um árin frá alivirkseminum. Hetta halda vit á Fiskaaling verða rættiliga slóðbrótandi – at vit í dag hava eina flokkingarskipan, ið kann flokka úrslit frá eini botndjórakanning í ymiskar dálkingarflokkar. Tað er hugsandi, at onnur lond eisini kunnu nýta somu mannagongd til at menna líknandi flokkingarskipanir.

Arbeiðið at menna flokkingarskipanina varð fíggjað av Havbúnaðarfelagnum og Umhvørvisstovuni. Fiskaaling stóð fyri granskingararbeiðinum og ein stýrisbólkur, við umboðum frá Havbúnaðarfelagnum, Umhvørvisstovuni, Havstovuni og Biofar, fylgdi arbeiðinum.



# LAKSALÚSIN

**Lús**

Lúsin er ein avbjóðing fyri alivinnuna, og nógv orka verður løgd í arbeiðið at basa lús. Ein av fyritreytunum fyri at kunna leggja ætlanir fyri at tálma lúsini er at skilja lívfrøðina hjá lúsini.

Tað eru tvey sløg av lús, sum eru ein ampi fyri alivinnuna – laksalúsin og seiðalúsin. Laksalúsin livir bara á laksafiski, meðan seiðalúsin kann seta seg á fleiri enn 100 ymisk fiskasløg.




← Laksalúsin skal ígjøgnum 8 búningarstig, áðrenn hon er vaksin og kann nørast. Lúsin kann ikki búnast longur enn stig 3, um hon ikki finnur ein laksafisk at festa seg á.

# FLEIRI ENN 127.000 LAKSAR TALDIR FYRI LÚS Í 2022

**Lús**

Fiskaaling telur allar tær lógarbundnu lúsateljingarnar. Hetta merkir, at vit hava teljarar, sum ferðast millum aliøkini at telja lús á 20 laksum úr hvørjum einasta aliringi í minsta lagi 14. hvønn dag. Úrslit frá teljingunum verða send alifeløgnum og løgd inn í talgildu aliskipanina hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Alifeløgini brúka úrslit av teljingum at leggja ætlan fyri at tálma lús, meðan Heilsufrøðiliga starvsstovan brúkar tølini til myndugleikaarbeiði.

Lúsateljingar eru eitt týðandi amboð hjá alifeløgunum at tilrættisleggja alivirksemi. Dátur frá lúsateljingum verða eisini brúktar í granskingararbeiðinum á Fiskaaling. Úrslitini hava givið nógva vitan, sum er til stórt gagns fyri alivinnuna. Harafturat bjóðar Fiskaaling feløgunum inn til kunning um lúsastøðuna eina ferð um mánaðin.

At telja lús er eitt krevjandi arbeiði, sum skal gerast, hóast veðrið stundum kann arga.





Lúsateljingar 2022

**588**
lúsateljingar

Laksar úr
**6.406**
aliringum taldir

**127.748**
laksar taldir

# MÓTSTØÐUFØRISKANNINGAR HJÁ LAKSALÚS

**Lús**

Lúsin er snild, og at berjast móti henni er helst ein kampur, ið ikki er møguligur at vinna. Tí er tað so umráðandi at skilja lúsina.

Dømi um snildið er mótstøðuførið móti kemiskum evnum. Tað hevur alivinnan upplivað fleiri ferðir. Tá kemisk evni verða nýtt, gongur ikki long tíð, áðrenn lúsin gert mótstøðufør. Hetta kann gerast ein stórur bági fyri alivinnuna, og tí mugu kemisk evni nýtast við størsta umhugsni.

Fiskaaling gjørdi mótstøðuføriskanningar fyri nøkrum árum síðani. Hesar kanningar steðgaðu, tá nýtslan av kemiskum evnum steðgaði. Nú alivinnan aftur nýtir kemisk avlúsingarevni er Fiskaaling aftur farið undir at gera mótstøðuføriskanningar. Hesar kanningar eru skipaðar sum ein tænasta til alivinnuna, t.v.s. at alivinnan kann umbiðja kanningar, har kannað verður, um laksalúsin er mótstøðufør móti ávísum kemiskum evnum. Møguleikar eru eisini at kanna, í hvønn mun laksalúsin tolir feskvatn, tí feskvatn verður eisini nýtt sum avlúsing.

Lúsayngul verður flutt við streyminum kring allar Føroyar. Hetta merkir, at um laksalús á einum firði er vorðin mótstøðufør, so kann mótstøðuføra lúsin koma til aðrar firðir. Tí eigur regluligt umsjón av mótstøðuføri hjá laksalús at skipast soleiðis, at fylgt verður við, hvussu mótstøðuføri mennist.

Á myndini sæst dømi um hvussu mótstøðuførar lýs verða aldar, tá ein og sami viðgerðarháttur verður nýttur. Mótstøðuføri kann í stuttum lýsast sum aling av lýs, ið tola ein viðgerðarhátt betur enn aðrar lýs. Í ringasta føri eru at enda einans lýs eftir, ið tola viðgerðina. Tá hevur viðgerðarhátturin mist sítt virðið, og alivinnan hevur mist eitt amboð at basa lúsini við.



# STÓR ALTJÓÐA VÍSINDALIG RÁÐSTEVNA UM LÚS

Ráðstevna

At fara á vísindaligar ráðstevnur at leggja fram granskingarúrslit, hitta granskarar, umrøða og viðgera úrslit og knýta sambond við aðrar granskarar er týðandi liður í granskingararbeiðinum. Tí var tað natúrligt, at Fiskaaling bjóðaði seg sum vert fyri altjóða vísindaligu ráðstevnuni Sea Lice Conference International 2022.

Í døgunum 9.-13. mai 2022 savnaðust 240 granskarar úr øllum heiminum í Norðurlandahúsinum at leggja nýggjastu granskingarúrslitini fram um lúsalívfrøði, arvafrøði, viðgerðarhættir, fiskavælferð, modellering, ávirkan á villfisk o.a. Fleiri enn 60 framløgur vóru, harav høvdu seks granskarar á Fiskaaling framløgu.

Eftir drúgvan steðg, orsakað av korona, vóru granskarar fegnir um at hittast aftur og kjakast um áhugaverdar granskingarverkætlanir og -úrslit, sum vórðu løgd fram í Norðurlandahúsinum. Tí tað er ikki bara í Føroyum, at lúsin er ein avbjóðing.

**SEA LICE CONFERENCE INTERNATIONAL**

Sea Lice ráðstevnan verður vanliga hildin annaðhvørt ár, og seinasta ráðstevnan var í 2018 í Kili. Í 2020 fekk Fiskaaling heiðurin at vera vertur, men vegna Covid-19-farsóttina varð ráðstevnan útsett. Áðrenn stóra tiltakið í Norðurlandahúsinum í 2022, skipaði Fiskaaling fyri ráðstevnuni á alnótini, til tiltakið Sea Lice International Online 2021.

Næsta ráðstevna verður í Skotlandi í 2024.



# SJÓSÍLAVERKÆTLANIN

**Sjósíl**

Tað var eftir áheitan frá Havbúnaðarfelagnum, at Fiskaaling fór í gongd við kanningarnar av sjósílum. Verkætlanin hevur higartil verið í tveimum pørtum:

1. Fella í Sandá, ið kannar nær sjóbúgvin sjósíl ferðast á sjógv á fyrsta sinni.
2. Kanning av trivnaðinum hjá sjósílum á sjónum.

Kanningarnar av sjósílunum fara fram við at Fiskaaling setur gørn eftir 50 sjósílum árliga, umframt at sílafiskarar senda inn roðslu og aðrar dátur til Fiskaaling.

Úrslitini frá 2019-2022 vísa m.a., at munur er millum árini, viðvíkjandi nær sílini fara á sjógv á fyrsta sinni, umframt at aldurin á sjósílunum, tá ið tey fara á sjógv fyrstu ferð, áhaldandi sæst aftur í støddini á teimum, sí mynd. Hetta er ein sterk ábending um, at tíðin á sjónum hevur nógv at siga fyri vøksturin hjá sílunum.

Sílini á sjónum hava flest lýs frá apríl til august, meðan tey restina av árinum hava fáar ella ongar lýs. Hetta gevur ábendingar um, at sílini avlúsa seg í feskum vatni. Tá ið tíðin á sjónum hevur stóran týdning fyri, hvussu væl sílini vaksa, kann tað hugsast at síl, ið noyðast at lúsa seg av í feskum vatni, missa týdningarmikla tíð á sjónum.






*Longdin á sílum; ið eru ávíkavist tvey og trý ár í feskum áðrenn tey fara á sjógv á fyrsta sinni.*

# SJÓGVGÓÐSKAN ÁVIRKAR FISKAVÆLFERÐINA

**Fiskavælferð**

Vatngóðskan á smoltstøðum ella sjógvi, hevur stóra ávirkan á fisk. Fiskur upptekur súrevni umvegis táknurnar, eins og ymiskur ótørvur frá fiskinum verður latin úr fiskinum. Á smoltstøðunum verður fylt væl við vatngóðskuni og til ber í stóran mun at reinsa vatnið soleiðis, at góðskan á vatninum er til gagns fyri fiskin.

Annarleiðis er við sjógvi, sum umframt at vera frískur, góður og stimbrandi fyri laksin, eisini kann innihalda ymiskar evarska lítlar verur, so sum mikroalgur og pinkuhvalspýggju. Fiskaaling hevur ment kanningarhættir at eyðmerkja ymisk sløg av mikroalgum og pinkuhvalspýggjum í sjógvi, ið verða mett at hava neilig árin á eitt nú táknurnar á laksi og harvið minka um fiskavælferðina.

Mikroalgur eru heilt smáar verur, ið kunnu eyðmerkjast við mikroskopi ella PCR-kanningum. Við hesum kanningarhættum ber til at eyðmerkja ymisk sløg av eitrandi mikroalgum og meta um nøgdina av teimum í sjónum. Ov stórar nøgdir av ávísum mikroalgum kunnu vera eitrandi fyri laksin ella tarna virknaðin hjá táknunum.

Nøkur sløg av pinkuhvalspýggju eru einans millimetrar til støddar, eru nærum glasklár og kunnu tí ikki síggjast við berum eygum. Pinkuhvalspýggja hevur fínar trevsar við kyknum, ið innihalda eiturevni, sum í stórum nøgdum kunnu verða skaðilig fyri alifisk.

Eisini hevur Fiskaaling gjørt eDNA kanningar av sjógvi fyri at kanna hvørji plantu- og djórasløg eru tilstaðar. Hesar kanningar eyðmerkja DNA slóðir av plantu- og djórasløgum og kunnu geva góðan kunnleika um lívfrøðiliga fjølbroytnið.



# ETISK VIÐGERÐ

Vælferð

Tá Fiskaaling fer undir at gera kanningar við fiski, skal ein etisk nevnd viðgera ætlaninar fyrst. Orsøkin er, at fiskurin ikki skal líða óneyðugt.

Um endamálið ikki stendur mát við, hvat kanningin inniber, verður verkætlanin ikki góðkend.

Í etisku nevndini sita tveir granskarar frá Fiskaaling við lívfrøðiligum førleika og ein djóralækni, sum ikki arbeiðir á Fiskaaling. Krav er, at ongin í nevndini, sum viðgerð kanningina, er knýttur at verkætlanini.

Til endans er eisini lógarkrav at Landsdjóralæknin gevur loyvi til, at granskingin kann fara fram.



Granskarar fylgja við rognkelsum í kørum.

PhD lesandi



## JESSICA DI TORO

Føðslutørvur hjá rognkelsi

**Tíðarskeið:** 2019–2023

Endamálið við verkætlanini er at kanna, hvussu røtt føði kann ávirka vælferð og harðføri hjá rognkelsum.

Í verkætlanini vórðu rognkelsi tikin úr føroysku náttúruni og ald rognkelsi kannað fyri, hvussu tey høvdu tað, hvat tey høvdu etið, og hvørji føðsluevni tey innihildu.

**Fígging:** Fiskaaling, University of Stirling, Bakkafrost, Havsbrún og Aker Biomarine.

**Innskriving:** University of Stirling.



## HEÐIN ABRAHAMSEN

Numeriskur strandamyndil av aldu og aldugjørdum ráki

**Tíðarskeið:** 2021–2024

Endamálið við verkætlanini er at kanna aldugjørt rák á firðunum við at nýta ein aldumyndil. Hetta er týðandi vitan, tá alingin flytur út á harðbalin økir.

**Fígging:** Fiskaaling, Innovationsfonden, Betri Stuðulgrunnurin, Mowi og Føroya-grunnurin.

**Innskriving:** Fróðskaparsetur Føroya og samstarv við granskingarstovnin Daltares í Hollandi.




## HEIDI S. MORTENSEN

Æðrakálking og hjartasjúkdómalæra av aldum laksi í Føroyum

**Tíðarskeið:** 2022–2026

Endamálið við verkætlanini er at kanna, um samanhangur er millum æðrakálking í krúnulívæðrini á laksi og felli í sambandi við ymiska handfaring av laksi.

Granskingin er sprottin úr norður-lendsku granskingarverkætlanini DigiHeart, sum Fiskaaling er við í.

**Fígging:** Fiskaaling, Granskingarráðið, Innovationsfonden.

**Innskriving:** Göteborgs Universitet.

# LAKSUR Á HARÐBALNUM ALIØKJUM

Vælferð

Salmon and the Surf er ein hálvtfjórða ára long postdoc verkætlan. Í verkætlanini kanna granskarar hvussu laksur ber seg at undir harðbalnum umstøðum.

Í vetrarmánaðunum vórðu alda og streymur mátað nærhendis alibrúkinum á Hestfirði. Samstundis vórðu trýstmátarar settir á eina alinót at máta, hvussu skapið á nótini broyttist, tá tað rak hart, ella tá nógv alda var. Ekkolodd undir sama ringi, sum høvdu trýstmátarar, mátaðu hvar í nótini, ið laksurin var. Harumframt filmaðu fimm myndatól fiskin javnan, soleiðis at tað bar til at eygleiða atferðina, tá streymurin var harður ella veikur, ella tá aldan var stór ella lítil.

Kanningarnar vístu fyrst og fremst, at nótin varð skumpað upp við rákinum. Hetta gjørdi, at fiskurin fekk minni pláss og fór tískil tættari saman. Fiskurin søkti eisini niður eftir, tá nógv alda var, og somuleiðis um dagin, tá ljóst var. Umframt at fiskurin søkti burtur frá vatnskorpuni í stórari aldu, so fór hann eisini inn eftir - tó ikki um tað eisini rak. Tá hesi viðurskifti vórðu løgd saman, so minkaði rásarúmið hjá fiskinum nógv, sum soleiðis hevði minni rúm í aliringinum.

Niðurstøðan var, at viðurskiftini undir mátingunum ongantíð vórðu ring fyri laksin. Hinvegin er greitt, at tá avgerð verður tikin um støðd á alieindum og hvar tær skulu vera, so skal hædd takast fyri, hvussu nógv minni rásarúm fiskurin kann hava, serliga tá bæði stór alda og harður streymur raka samstundis.



# ATLJÓÐA MENNINGARSAMSTARV

**Atljóða menningar-samstarv**

Fiskaaling hevur avtalu við Uttanríkistænastuna um altjóða menningarsamstarv. Orsøkin til avtaluna er tann, at vit ásanna at Føroyar sum framkomin alitjóð hevur skyldu at deila vitan um aling við onnur lond. Endamálið við samstarvs-avtaluni er at virka fyri mátt-menning (Capacity Development) við útbúgving, gransking og vitanardeiling og seta í verk átøk, sum hava til endamáls at breiða út vitan og serkunnleika til frama fyri menning og "good governance" innan aling í menningarlondum við denti á smáoyggjaríki í menning og strandarlond í menning.

Í hesum sambandi hevur Fiskaaling fingið í lag samstarv við íslendska vitanarstovnin GRÓ, sum hevur drúgvar royndir við altjóða menningarsamstarvi innan fiskivinnu og seinni eisini alivinnu. Menningarsamstarvið í Íslandi er skipað við at umleið 20 fólk út ymiskum menningarlondum koma til Íslands á eitt ½ ára undirvísingarskeið, ið gevur luttakarum akademiska og praktiska útbúgving innan aling.

Partur av útbúgvingini er eisini at luttakararnir skulu gera eina verkætlan, ið er tengd at viðurskiftum í teirra heimlandi.

Ítøkiliga úrslitið av samstarvinum millum GRÓ og Fiskaaling er, at Fiskaaling hevur ein virknan leiklut í skeiðnum 2022-2023, ið kallast Burðardygg alivinna. Hetta merkir, at starvsfólk frá Fiskaaling hava verið í Íslandi og havt framløgur um aling, við serligum denti á umhvørvi og fiskavælferð, og at fýra fólk úr ávikavist Jamaika, Kosta Rika, Nikaragua og Kenja hava verið í Føroyum á námsferð. Á námsferðini vitjaðu tey Bakkafrost, Havsbrún, Mowi, Hiddenfjord, Ocean Rainforrest, Heilsufrøðiligu starvsstovuna og heilsaðu uppá landsstýrismannin, ið hevur ábyrgd fyri altjóða menningarsamstarvi. Eisini fingu tey undirvísing í ymiskum viðkomandi evnum frá granskarum á Fiskaaling, umframt at Fiskaaling veitir uppgávuvegleiðing í sambandi við verkætlan, ið snýr seg um vatngóðsku og fiskavælferð.





# ÁRIÐ 2022

**Samanumtøka**

Samanumtikið var árið 2022 væleydnað fyri Fiskaaling. Vitan og granskingarúrslit frá Fiskaaling vórðu javnan løgd fram á vísindaligum ráðstevnum og útgivin í altjóða tíðarritum. Harafturat samstarvaðu granskararnar nógv við føroyskar og altjóða granskingarstovnar, og luttóku í vísindaligum verkætlanum, verkstovum og arbeiðsbólkum.

Granskingar- og tænastuvirksemið hjá Fiskaaling er grundarlag undir áhaldandi menning av nýggjari og betri vitan, ið beinleiðis gagnar alivinnuni. Eins og undanfarnu ár kunnu vit staðfesta at eftirspurningur er eftir vitanini hjá granskarum á Fiskaaling.



**P/F Fiskaaling**
Við Áir 11
430 Hvalvík

Tel. 47 47 47
fiskaaling@fiskaaling.fo

**fiskaaling.fo**